

www.oljan.fo

**Jan Müller** 26 - 01 - 2013

# ExxonMobil bora við Føroyar og Írland í ár

Um nøkulunda somu tíð sum heimsins størsta oljufelag, ExxonMobil fer at bora afur á føroyska landgrunninum, fer felagið eisini at seta borin í undirgrundina eina aðrastaðni á Atlantsmótinum, nevniliga vestan fyri Írland. Felagið hevur stórar vónir til oljufund í hesum báðum økjum. Virkið á Atlantsmótinum Amerikanska oljufelagið ExxonMobil er eitt av teimum stóru altjóða oljufeløgunum, sum hevur góðar vónir til oljufund á Atlantsmótinum - økið, ið gongur frá Norskahavinum til landgrunnin millum Føroyar og Hetland og víðari til leiðirnar vestan fyri Írland. Felagið hevur fleiri leitiloyvi á Møre og Vøringleiðunum vestan fyri Norra, har jarðfrøðin líkist nógv henni í Føroyum við nógvum basalti. Somuleiðis er felagið við í fleiri leitiloyvum í Føroyum. Írland Fara vit longur suður á Atlantsmótinum hevur ExxonMobil eisini leingi víst áhuga fyri økinum vestan fyri Írland. Enn er bert eitt gassfund gjørt í økinum, men stórar vónir eru til at finna olju her eisini. Og nú ger heimsins størsta oljufelag so álvara av ætlanum sínum og hevur leigað boripallin Erik Raude til at bora Dunquin leitimiðið í ár. Boringin er mett at taka seks mánaðir og kostar 600 milliónir kr. Meðan felagið er fyristøðufelag í boringini í Írlandi er tað partur av loyvi í Føroyum, har Statoil er fyristøðufelag. Talan er um Brugduna 2 brunnin, sum byrjað varð at bora í fjør, men sum varð steðgaður fyri at halda fram aftur í ár. Enn er ikki greitt, hvør boripallur verður brúktur til framhald av hesi boringini.